DAGSINS MEINING

Sparing og fíggjarlóg

Spennandi og avgerandi dagar standa fyri framman. Dagar, sum skulu gera av lagnuna hjá mongum føroyingi. Sparingarnar á figgjarlógini, sum landsstýrið hevur boðað frá, fara uttan iva at merkjast í øllum samfelagnum. Lagt hevur verið upp til eina sparing uppá 1% í øllum ráðum, men tá avtornar verður hetta helst væl hægri, tí við verandi búskapargongd er 1% sparing helst ov lítið til tess at fáa endarnar at røkka saman.

Neyvan er nakar ósamdur við landsstýrinum, tá talan er um at rationalisera og effektivisera eitt nú almenna sektorin. Men vit mugu eisini ansa eftir, at hetta ikki bara vera klisjéir og undanførsla.

Tað er líkasum, at umboðini fyri samgonguna, ið høvdu orðið undir viðgerðini av løgmansrøðuni, ikki hava gjørt sær álvaran og støðuna greiða – at tað gongur skeiva vegin í samfelagnum og við búskapinum. Higartil hevur alt borið til, ja entá at skarva nærum 400 mill. kr. av blokkinum við einum høggi pluss ta multiplikatoreffekt tað nú einaferð hevur. Hetta um somu tíð sum yvirtøkur eru framdar og fleiri skulu fremjast. Alt hevur borið til og tykist enn bera til hjá samgonguni.

Men nú stendur hon so andlit til andlit við ein nýggjan veruleika, sum hon ikki hevur sæð nakað til øll tey fimm árini hon hevur sitið við valdinum. Hesi árini er vøksturin í búskapinum komin av sær sjálvum. Stór og føgur hava orðini verið um, hvussu væl tað hevur gingið. Nú hevur pípan fingið annað ljóð. Nú skal sparast. Nú verður bráddliga tosað um, hvussu nógv almenna fyrisitingin er vaksin, ja bólgnað upp. Sagt verður millum linjurnar, at hetta líkist ongum, og nú skal annað skinn takast um bak. Hetta er ov lætt sloppið. Tí tað er henda samgongan, sum einsamøll hevur økt almennu umsitingina so nógv fyri at kunna sita við maktini. Fleiri landsstýrisfólk aftrat er prísurin. At hon nú er tvingað til at fremja stórar sparingar kann so eisini blíva hennara banasár. Men langt er til val og tí má hugsast, at landsstýrið fer at taka skrædlið nú heldur enn seinni.

Tað fer so at merkja, at týðandi funktiónir hjá tí almenna verða skerdar og amputeraðar tvs. at starvsfólk verða søgd upp, tey, sum eru eftir, koma at renna skjótari og brúkarin fer at verða stóri taparin eisini.

Sjálvandi vil ein alt ov stórur almennur yvirbygningur samtíðis sum kutað verður stórur biti av blokkinum um somu tíð sum búskapurin gongur niður á bakka og nýggjar yvirtøkur skulu fremjast gera, at tað fer at mangla í nógva staðni í samfelagnum. Her er bert eitt at gera, og tað er hjá løgmanni at fáa reinsað luftina og skriva út val. Eitt úrslit av tí kundi so verið, at vit fingu tí so nógv umtalaðu breiðu samgonguna. Tað líkist ongum, at tveir pinkuflokkar skulu gera av, hvør stýrir landinum og hvussu landið verður stýrt. Vit hava brúk fyri eini samgongu við fleiri stórum flokkum, so ábyrgdin liggur á fleiri og breiðari herðum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Dimman sponsorerar eisini Listastevnu Føroya

Oddfríður Marni Rasmussen
Formaður í LISA, Listafólkasamband Føroya

Eg kenni meg noyddan at svara Inga Samuelsen aftur, sjálvt um hatta, sum hann skrivar ikki er vert at svara aftur. Eg svari aftur bert tí, at eg vil forsvara tey mongu listafólkini, sum eru limir í LISA (Listafólkasambandi Føroya).

Ingi peikar á, at atgongumerkini til framførðslurnar við føroyskum luttakarum, eru ov dýrar. Tey dýrastu atgongumerkini til føroyskar framførðslur kosta 225 krónur á Listastevnuni, meðan tey kosta millum onki og 100 krónur restina av árinum, sigur Ingi Samuelsen. Listastevnan hevur lagt eitt kostnaðarstøði, sum eftir mínum tykki (og eg veit eisini, at nógv onnur eru samd við mær í hesum) átti at verið kostnaðarstøði alt árið. Onki listafólk eigur at gera nakað ólønt. Eisini kann sigast, at grundin til, at atgongumerkini kosta 225 krónur og ikki 500 krónur ella meir, er tí at vinnulívið hevur sponsurerað við nógvum pengum. Eisini Dimman hevur spítt 100.000 krónur í eitt Listastevnublað, og høvdu tit á Dimmuni ikki gjørt tað, kostaðu atgongumerkini helst einar 50 krónur meir fyri hvørja sýning, og tað er bert at fegnast um.

Lurta eftir upptøkunum frá 2000 og 2003, og hoyr munin!

Heri Simonsen

Skal ein lurta eftir útvarpsupptøkum, sum geva fatan av hvussu ólavsøkusangurin skal ljóða, og hvussu hann ikki skal ljóða, skal ein lurta eftir upptøkunum frá 2000 og 2003. Upptøkurnar frá 2000 vísa hvussu hann skal ljóða, bæði tekniskt og við einum sangúrvali, sum fólkið kennir. Upptøkurnar frá 2003 vísa hvussu hann ikki skal ljóða, bæði tekniskt og í aðrar mátar. Víst vóru nakrir sangir við í ár, sum fólkið kennir, men tað vóru ov nógvir sangir – um vakrar yrkingar – sum fólkið ikki kendi, og ikki dugdu at syngja (kendu ikki løgini!). Og tað kendist, sum um hvørja ferð vit sungu ein góðan og kendan, at vit blivu »dykkaði« við einum ókendum sangi beint aftaná. Ein vøkur yrking ella solosangur merkir væl ikki, at hesin er vælegnaður til felagssang hjá 12.000 fólkum, ella?? Ein dani kom allan vegin úr Hvannasundi fyri at uppliva ólavsøkusangin, men talan varð um »flop« og »skuffelse« fyri hansara viðkomandi. Før okkum aftur til ár 2000, so fólkið aftur sleppur at syngja sínar yndissangir. Fyri at umskriva Churchill: »It was our finest hour!«. Í 2002 varð tað tekniska eisini vánaligt, men løtan bleiv (hálv)bjargað við einum (fyri fólkið) kendum sangúrvali. Vit gevast her! Vónandi nær 2004 somu hæddir, sum 2000. Ólavsøkusangin í 2000 skalt tú fáa (Riddara)rós fyri, Ólavur!

Vinnari í kapping um kapping

Nú kappast skal
um kapping í
kapping um kapping at kappast
skal eg halda meg til
at kappast um
kapping um kapping
í kapping um kapping
so er bert at vóna
at dómsnevndin fer
at kappast um
kappingina at kappast
um kappingina at
velja bestu kappingina um kapping
um at kappast um
bestu kappingina –
tað verður ein
rimmar kapping –
tað er altið gott
at kappast

Erling S.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Vænta minking í toskaveiðini í ár

Toskaveiðan í fjør var ógvuliga góð, stívliga 40.000 tons.
- Vit vænta eina minking í veiðini í ár, helst við eini 5.000 tonsum ella so, sigur Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni.
Hann fegnast um, at løgtingið samtykti at skerja fiskidagarnar við 2 prosentum, men heldur, at skerjingin er alt ov lítil

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

- Vit vænta, at toskaveiðan í ár verður eini 5.000 tons minni enn seinasta ár, sum var eitt av teimum heilt góðu árunum, sigur Hjalti í Jákupsstovu

Eitt miðalár er toskaveiðan undir Føroyum eini 25.000 tons, rund vekt. Okkurt árið hava vit fiskað nógv meira enn miðaltalið, men fara vit góð 10 ár aftur í tíðina, hevur veiðan eisini verið nógv lakari – enntá heilt niðri á eini 6.000 tonsum.

Toskaveiðan seinasta ár var ógvuliga góð, stívliga 40.000 tons, og í 1996 fiskaðu vit eisini meira enn 40.000 tons. Miðskeiðis í áttatiárunum var eisini nógvur fiskur at fáa, og í 1985 fiskaðu vit stívliga 39.000 tons av toski undir Føroyum.

Hóast eina minking uppá 5.000 tons, verður toskaveiðan í ár helst eini 10.000 tons betur enn eitt miðalár

Vaksandi veiðitrýst

Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni, sigur, at tá ið stovnurin í summar mælti til ein niðurskurð í fiskidagatalinum komandi 2-3 árini uppá 25%, var málið at byrgja uppfyri, at eitt nú toskafiskiskapurin aftur minkar niður í lítið og lætt. Annars er tað serliga fiskasløgini, toskur, upsi og hýsa, sum verjast skal um við eini minking av fiskidagatalinum.

- Vit fegnast sjálvsagt um, at løgtingið samtykti ein lítlan niðurskurð í fiskidagatalinum uppá 2%, men vit halda ikki, at hetta er nóg mikið, skulu fiskastovnarnir umsitast skynsamiliga, soleiðis sum gongdin er beint nú.

Hjalti sigur, at veiðitrýstið er vaksandi og heldur, at tað er vorðið ov stórt. Haraftrat kemur, at gróðurin í sjónum var lítil síðsta ár, og hóast meira gróður er í ár, er málið fyri gróður framvegis undir miðal.

- Tað hevði verið óheppið, um toskafiskiskapurin aftur minkaði niður á sama støði sum fyrst í nítiárunum. Vit eiga tí at gera tað, vit kunnu fyri at byrgja uppfyri, at veiðitrýstið veksur, og at veiðan minkar langt niður um tað, hon er eitt miðalár. Málið eigur at vera, at fiskiskapurin er so støðugur, sum nú einaferð til ber við teimum náttúruviðurskiftum, sum eru galdandi.

»Vit eru fastløntir«

Hjalti sigur, at Fiskirannsóknarstovan byggir síni tilmæli á tær kanningar, sum stovnurin ger og ta vitan, sum stovnurin hevur. Sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, skal Fiskirannsóknarstovan geva landsstýrinum ráð um burðardyggan fiskiskap.

- Tað eru ikki vit, sum verða raktir, um tað gongst illa í vinnuni, tí vit hava fasta løn. Tey, ið verða rakt, eru fiskimenn, skip, vinna og samfelagið annars. Okkara uppgáva er tí ikki tengd at øðrum áhugamálum enn at veita so holla ráðgeving, sum vit nú einaferð eru førir fyri.

At hetta ikki altíð er so lætt, tá ið náttúruviðurskifti spæla fiskifrøðingum eitt »puss«, veit eingin betur enn Hjalti sjálvur.

- Tá ið politiski myndugleikin ár undan ári ikki tekur okkara ráð til eftirtektar, er bert at vóna, at gongdin ikki verður, soleiðis sum útlitini kunnu benda á, sigur hann.

Leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni vísir á, at fiskidagarnar kunnu vit áseta sjálvi, men tað eru ikki vit, sum avgera, hvussu náttúruviðurskiftini hátta sær.

- Tí er tað ikki so einfalt at siga við vissu, hvat hendir – antin vit velja at gera hetta ella hatta, leggur hann aftrat.

Útróðrarflotin

Hjalti heldur, at ein partur, sum lítil hædd verður tikin fyri í metingini av veiðitrýstinum, er útróðrarflotin, har bátar verða skiftir út við nýggjari og skjóttgangandi bátar við egningatrakt.

- Hesir bátar eru meira effektivir enn teir gomlu, og teir fara ofta langan veg til útróðrar.

Hann fegnast um, at nýggj skip eru komin í flotan, men ásannar, at útskiftingarnar ofta hava ein tendens til øking av veiðitrýstinum.

- So hvørt, sum skip og bátar verða skift út við betri og effektivari fiskifor, veksur trýstið á fiskastovnarnar eitt sindur hvørja ferð. Sum árini ganga, verður vøksturin í veiðitrýstinum ikki so lítil, heldur Hjalti í Jákupsstovu.

Magnus Heinason ger yvirlitstrolingar

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Rannsóknarskipið, Magnus Heinason, ger í hesum døgum summar-yvirlitstrolingar á landgrunninum.

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at endamálið við hesum trolingum er at finna út av, hvussu støðan hjá fiskastovnunum er.

- Hetta eru neyvan kanningar, har nøkur hundrað tóg verða gjørd um allan landgrunnin í ein heilan mánaða. Vit gera tveir túrar, sum vara í einar 14 dagar hvør.

Sami reiðskapur á somu leiðum…

Leiðarin sigur, at Magnus Heinason brúkar sama fiskireiðskap til hesar kanningar á hvørjum ári og leiðirnar, sum verða kannaðar, eru eisini tær somu.

- Hetta er tann vaksni fiskurin, sum verður kannaður og eftir hvørt tóg, verða eitt nú aldursbýti, vøkstur og føðin skrásett.

- Tá ið yvirlitstrolingarnar eru lidnar, verða samanberingar gjørdar við árini frammanundan, sigur hann.

Petur og Jákup

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at yvirlitstrolingarnar eru ein liður í stovnsmetingini. Hendan fyrsta túrin er Petur Steingrund við Magnusi Heinasyni, og á seinna túrinum verður Jákup Reinert við.

Yvirlitstrolingarnar hjá Magnusi Heinasyni eru ein liður í stovnsmetingini hjá Fiskirannsóknarstovuni